# Helena má kannast ókeypis

*Fíggjarnevndin er samd um at mæla tinginum frá at játta løgmanni 400 túsund krónur til at fáa ein advokat at gera eina løgfrøðisliga meting av handfaringini hjá Helenu Dam á Neystabø av pensjónsmálinum*



*Embætisførslan hjá Helenu Dam á Neystabø liggur nú á herðunum hjá løgmanni einsamøllum. Fíggjarnevndin mælir løgtinginum frá at játta løgmanni pening til eina løgfrøðisliga niðurstøðu av framferðarháttinum í pensjónsmálinum*

JOHN JOHANNESSEN

Løgmaður fær í fyrstu atløgu ikki tað løgfrøðisliga grundarlagið, hann hevði ætlað, at taka støðu út frá í málinum um handfaringina hjá Helenu Dam á Neystabø av pensjónsmálinum.

Hetta er greitt, eftir at fíggjarnevnd løgtingsins hevur viðgjørt eykajáttanaruppskotið hjá landsstýrinum fyri september.

Álitið hjá fíggjarnevndini er enn ikki lagt fyri tingið. Men Sosialurin hevur fingið váttað frá limum í fíggjarnevndini, at tað er ein samd nevnd, ið mælir løgtinginum frá at játta løgmanni tær 400 túsund krónurnar, ið krevjast fyri at tað skal bera til hjá løgmanni at fáa ein løgfrøðing at meta um, í hvønn mun Helena Dam á Neystabø hevur brotið landsins lógir í pensjónsmálinum.

### Góðtekur ikki frágreiðingina

Landsstýrismálanevndin, ið er amboð hjá løgtinginum at halda eftirlit við landsstýrinum, viðgjørdi fyrr í ár málið.

Men løgmaður er ónøgdur við frágreiðingina frá landsstýrismálanevndini. Orsøkin er, at landsstýrismálanevndin í staðin fyri at gera eina beinleiðis niðurstøðu í málinum setir fram nakrar spurningar, ið geva eina ábending um, at Helena Dam á Neystabø hevur borið seg skeivt at.

Løgmaður heldur ikki, at hetta er nóg mikið til, at hann kann taka eina støðu í málinum. Tí hevur hann biðið tingið um 400 túsund krónur, so hann kann seta ein óheftan løgfrøðing at kanna, um landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur umsitið síni málsøki á lógligan og fullgóðan hátt.

Fylgir løgtingið tilmælinum frá fíggjarnevndini, fær løgmaður onga óhefta frágreiðing, og má hann tí í staðin finna aðra loysn á málinum.

### Roynir við 13 tingmonnum

Sosialurin hevur spurt løgmann, hvat hann fer at gera við hetta nógv umrødda mál, nú tað letur til, at hann ikki fær pening játtaðan til óheftan løgfrøðing gjøgnum eykajáttanaruppskotið.

– Fái eg ikki peningin, havi eg ein møguleika eftir. Tað er at fáa 13 tingmenn at heita á løgtingið um at gera eina løgfrøðisliga kanning av málinum, sigur løgmaður.

Um hetta ikki eydnast, heldur løgmaður seg ikki hava nakað grundarlag at taka støðu út frá. Hann heldur seg ikki hava nakað, ið beinleiðis prógvar, at Helena Dam á Neystabø hevur borið seg skeivt at.

Innanhýsisskjøl frá embætisfólkum hjá Almanna- og Heilsumálastýrinum siga, at Helena Dam á Neystabø hevur verið á kant við lógina, men tey staðfesta ikki, at hon hevur brotið lógina. Tí heldur løgmaður ikki, at hesi skjøl kunnu nýtast sum grundarlag.

### Løgmaður hevur ábyrgdina

Um løgmaður fær óhefta niðurstøðu frá løgfrøðingi sum grundarlag undir síni støðutakan ella ei, so er tað løgmaður, sum sambært stýrisskipanarlógini hevur ábyrgdina av sínum landsstýrismonnum.

Hetta staðfestir løgfrøðingurin, sum fíggjarnevndin undir viðgerðini av eykajáttanaruppskotinum, hevur biðið gera sær eina løgfrøðisliga meting av málinum.

Løgfrøðingurin, Sjúrður Rasmussen, staðfestir í frágreiðing síni, at »løgmaður ikki kann kasta ábyrgdina frá sær við at seta ein óheftan serfrøðing at gera eina niðurstøðu. Hann má sjálvur gera eina niðurstøðu um serfrøðingaúrslitið, og um niðurstøða hansara eigur at fáa rættarligar ella politiskar avleiðingar.«

Serfrøðingaúrslitið, løgfrøðingurin nevnir, er úrslitið hjá landsstýrismálanevndini.

Tískil liggur málið um embætisførsluna hjá Helenu Dam á Neystabø í seinasta enda á herðunum hjá løgmanni einsamøllum. Tí løgmaður ger einsamallur av, um hann velur at seta landsstýrismann frá, og tað er eisini ein rein politisk meting, um løgmaður velur at seta ein landsstýrismann frá.

Harafturat kann løgmaður sambært stýrisskipanarlógini verða drigin fyri nevningating, um tað vísir seg, at landsstýrismaður hevur borið seg skreivt at, og løgmaður einki hevur gjørt við tað.

### Bara bíðar

Helena Dam á Neystabø hevur ongar ætlanir um sjálvt at heita á løgmann um at verða loyst úr landsstýrissessinum, hóast nógva rokið, sum nú í skjótt eitt heilt ár hevur verið um nýggju pensjónslógina.

– Eg havi valt bert at hyggja frameftir og leggja mína orku í mál, sum skulu loysast í løtuni, sigur Helena Dam á Neystabø.

Um tað fær avleiðingar fyri samgonguna, um løgmaður velur at siga hana úr landsstýrissessinum, veit Helena Dam á Neystabø ikki.

– Hatta er ein spurningur, sum fer at verða viðgjørdur í flokkinum, um hann verður aktuellur, sigur Helena Dam á Neystabø.



*Útvarpshøllin er fyri fleiri tinglimir ov stór í vavi til tingfundir*

## Troyttir av útvarpshøllini

*Tinglimir eru farnir at troyttast av at halda tingfundir í útvarpshøllini. Teir meta karmarnar vera ov stórar*

JOHN JOHANNESSEN

Útvarpshøllin er sambært fleiri tinglimum, Sosialurin hevur tosað við, ov stór til tingfundir.

Av tí, at karmarnir so stórir, dovnar orðaskiftið burtur í einki, halda fleiri ting- og landsstýrismenn.

Orðaskiftið um fíggjarlógaruppskotið fyri 2001, sum hol varð sett á týsdagin, hevur verið ógvuliga tamt. Hetta halda tinglimir vera orsakað av, at útvarpshøllin er so mikið stór, at ikki ber til hjá løgtinginum at fáa í lag eitt orðaskifti, sum er eins intimt, sum orðaskiftini í tinghúsinum plaga at vera.

Tá løgtingið 19. september helt fyrsta tingfundin í útvarpshøllini, vóru fleiri tinglimir, ið mettu útvarpshøllina vera nógv betur egnaða til tingfundir, enn vanligi tingsalurin. Sjálvur løgtingsformaðurin var ein teirra, ið tók undir við hesum sjónarmiðið.

Men nú eru tinglimir farnir at ótolnast eftir at sleppa aftur í heimliga tingsalin. Hetta sleppa teir eisini um ikki so langa tíð, tí handverkararnir, sum eru í ferð við at skifta klædning, vindeygu og tak á løgtingshúsinum eru um at verða lidnir.



# Røkka fullveldinum á annan hátt

*Málið er enn tað sama, men partur av Fólkaflokkinum vil skifta kós í fullveldismálinum, fyri at koma leiðina fram*

JOHN JOHANNESSEN

Landsstýrið arbeiðir av øllum alvi við einum nýggjum uppleggi at leggja fyri donsku stjórnina á samráðingarfundinum 26. november.

Men stendur tað til stóran part av Fólkaflokkinum, verður hetta eitt upplegg, ið hevur møguleika fyri at fáa undirtøku, bæði frá donsku stjórnini og frá einum parti av føroysku andstøðuni.

### Fáa fólkið við

Í røðu síni, tá Fólkatingið í seinastu viku varð sett, segði Óli Breckmann, at vit mugu finna eina góða avtalu, sum teir tríggir fjóðringarnir av føroyingum, sum ynskja víðkað sjálvstýri, taka undir við.

Eisini segði Óli Breckmann, at landsstýrið heilar tríggjar ferðir hevur samráðst við stjórnina við sama uppleggi uttan úrslit. Hetta heldur hann vera einaferð ov nógv.

Tí mælir Óli Breckmann til, at landsstýrið fer til Danmarkar at samráðast við einum uppleggi til ein sáttmála, ið gevur Føroyum fullveldi um nøkur ár. Hann mælir til, at landsstýrið arbeiðir við at fáa evsta vald til løgtingið á ein hátt, ið líkist sjálvstýrisuppskotinum hjá Javnaðarflokkinum.

– Síðani veldst bert um dirvið hjá landsstýrinum at fáa blokkin trappaðan so skjótt niður sum møguligt, so vit fáa fullveldi so skjótt sum møguligt, sigur Óli Breckmann.

### Lukkað land

Sosialurin hevur biðið løgmann um viðmerkingar til hesa støðu, men hann vil einki annað siga, enn at landsstýrið arbeiðir væl og virðiliga við at fyrireika seg til samráðingarnar.

Heldur ikki Bjarni Djurholm ella Jørgen Niclassen, ið áður eru komnir við markantum sjónarmiðum um fullveldisætlanina, vilja gera stórvegis viðmerkingar.

Bjarni Djurholm sigur , at hann varð skeivt endugivin í Sosialinum, tá tíðindi herfyri vórðu borðin um, at hann og Jørgen Niclassem hildu, at kósin í fullveldismálinum mátti leggjast um. Og hann leggur afturat, at Fólkaflokkurin er samdur um málið í fullveldisætlanini, men hann vil ikki siga, um flokkurin er samdur um, hvussu málið skal røkkast.

– Eg kann tó enn einaferð staðfesta tað, sum eg segði á ólavsøku. Fullveldisætlanin eigur at verða koppað á høvdið, sigur Bjrani Djurholm.

Jørgen Niclasen vísir eisini á røðuna, hann helt í sambandi við løgmansrøðuna á ólavsøku. Í røðuni sigur hann, at fullveldistokið má steðga á við millumstøðirnar, fyri at taka fólk við.

– Tí er tokið ikki fullsett ella í minsta lagi væl og virðiliga hálvsett, steðgar tokið og rutan verður niðurløgd.

– Vit í Fólkaflokkinum mugu gera okkum greitt, at longu á komandi samráðingarfundi mugu vit allir vísa vilja til at flyta okkum, leggur Jørgen Niclassen afturat.

Rúna Sivertsen og Jógvan á Lakjuni halda tó, at vit eiga at fáa fullveldismálið avgreitt sum skjótast.

Hvat tað er, sum Fólkaflokkurin vil broyta í fullveldismálinum, ber ikki til at fáa at vita. Men vit kunnu staðfesta, at ein partur av Fólkaflokkinum ynskir, at kósin í fullveldismálinum skal broytast, meðan ein annar tekur undir við kósini, sum hon er.



*Hvat tað er, sum gongur fyri seg í Fólkaflokkinum fyri tíðina, er torført at fáa at vita. Men nógvar ábendingar eru um, at flokkurin ikki er heilt samdur um, hvør kósin í fullveldismálinum skal vera*

Mynd: Jens Kristian Vang


bobcat -maskinurnar sum halda!

• Gravmaskinur –nógv model
• Lessarar við óteljandi møguleikum!

Vælegnaðar til byggivirkir, entrepenørar, bøndir, jarðarbrúk o.a.

Keyp góðsku – keyp Bob Cat!



Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820



Føðingardagstilboð

Nýggir bilar:

ASTRA st.car úr 149.000,- *spar 24.000,-*

VECTRA 2.0 DTI úr 190.000,- *spar 25.000,-*

ASTRA 5-hurðar úr 145.000,- *spar 24.000,-*

FRONTERA Jeepur - gráur 4x4·2,2TD 205.000,- *spar 43.000,-*



Vit hava opið leygardagin frá kl. 10.00 - 15.00

Brúktir bilar:

| | ár | fyrr | nú |
|---|---|---|---|
| **Citröen Xantia** | | | |
| St.car, Diesel...... | '96 | 138.000,- | 120.000,- |
| **Vectra** | | | |
| 4 hurð., Diesel... | '96 | 125.000,- | 110.000,- |
| **Peugeot 306** | | | |
| 4 hurð., Diesel... | '95 | 98.000,- | 75.000,- |
| **Corsa.** | | | |
| 5 hurð., 1.4........ | '95 | 78.000,- | 68.000,- |

| | ár | fyrr | nú |
|---|---|---|---|
| **Astra** | | | |
| St.car................. | '97 | 98.000,- | 75.000,- |
| **Peugeot 306** | | | |
| St.car, 2.0.......... | '98 | 138.000,- | 125.000,- |
| **Toyota Carina** | | | |
| 5 hurð. ............ | '90 | 55.000,- | 40.000,- |
| **Toyota Corolla** | | | |
| 3 hurð.,aut.gear.. | '97 | 99.000,- | 85.000,- |



OPEL
við Oyggjarvegin
Tel 316161
Fartel 216160